# ítróttur

Nr. 27 • mikudagur • 9. februar 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Upp- og niðurflytingardystir strikast

**Á aðalfundinum hjá FSF komandi leygardag fer kappingarnevndin hjá fótbóltssambandidnum at leggja fram uppskot um, at upp- og niðurflyting fer bert fram millum fremsta og aftasta liðið í deildunum**

UPP- OG NIÐURFLYTING

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Stendur tað til kappingarnevndina hjá FSF, so verður tað bert tað fremsta liðið í 2. deild, sum fer at hava møguleika fyri at flyta upp í 1. deild árið eftir. Uppskotið hjá kappingarnevndini hevur nevnliga við sær, at næstfremstu liðini ikki hava møguleika fyri at vinna sær uppflyting, men næstaftastu liðini sostatt sleppa at halda fram í deildini.

## Ov stórur munur

Formaðurin í kappingarnevndini, Bjarki Mohr, sigur, at skipanin, har spælt hevur verið millum næstfremstu og næstaftastu liðini um upp- og niðurflyting, hevur nú verið roynd í fimm ár, og hesi ár hava víst, at tað er rættuliga stórur munur á liðunum í allarflestu førum.

– Vit hava fleiri ferðir í hesum dystunum sæð, at tað er enda við skrædi, tí at munurin sum oftast hevur verið so mikið stórur, serliga millum fremstu og næstfremstu deildina. Tað hevur eisini mangan víst seg at verða ógvuliga torført at fáa dystirnar avgreiddar, og tað haldi vit verða harmiligt, sigur Bjarki Mohr.

Formaðurin í kappingarnevndini leggur tó dent á, at tað fyrst og fremst er stóri munurin á liðunum, ið er høvuðsorsøkin til, at kappingarnevndin leggur lógaruppskotið um at strika upp- og niðurflytingardystirnar fyri aðalfundin hjá FSF leygardagin.

– Í allarflestu førum er tað liðið úr ovaru deildini, ið hevur vunnið dystirnar um upp- og niðurflyting, og eg haldi, at tað eru bert tvey dømir um tað øvugta, sigur Bjarki Mohr.

# Longri millum leikbannini

**Komandi leygardag hevur Fótbóltssamband Føroya aðalfund, og tá fer Kappingarnevndin hjá FSF at leggja fleiri áhugaverd uppskot fyri fundin. Eitt nú er ætlanin, at tað skal gerast longri millum leikbannini í 1. deild**

FÓTBÓLTSLÓGIR

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Eitt tað mest áhugaverda uppskotið, ið kappingarnevndin fer at leggja fyri aðalfundin, er tað um leikbann í 1. deild. Seinnu árini hevur tað verið so, at ein leikari fær leikbann, tá ið hann hevur fingið trý gul kort, men í uppskotinum hjá kappingarnevndini verður lagt upp til, at hetta verður broytt til fimm gul kort, áðrenn spælari verður leikbannaður.

## Vilja verja smáu feløgini

Samstundis sum ætlanin er, at tað skulu fleiri gul kort til, áðrenn spælari fær leikbann, er eisini í uppskoti at strika gomlu lógirnar, har ein spælari fekk leikbann fyri hvørt einasta gult kort, tá ið hann hevði fingið eitt ávíst tal av ávaringum.



*Nú skulu fleiri kort á lofti, áðrenn leikarar í bestu deildini fáa leikbann*
*Savnsmynd*

– Kappingin í ár verður jú væl drúgvari enn undanfarin ár, og allarhelst harðari eisini, og tí hava vit valt at mæla til hesar broytingar, so at leikarar ikki sita uttan fyri við leikbanni heilum, sigur Bjarki Mohr, formaður í kappingarevndini hjá FSF.

Bjarki Mohr sigur, at hetta verður serliga gjørt fyri at verja smærru feløgini. – Vit eru vitandi um, at tey smærru feløgini hava nógv minni leikarahóp enn tey stóru feløgini, og tí fara tey óivað at merkja tað harðari, at kappingárið verður longt munandi, sigur formaðurin í kappingarnevndini.

Í uppskotinum til aðalfundin stendur eisini , at dómarin skal skrivliga boða Kappingarnevndini frá teimum ávaringum (gult kort), ið givnar verða. Hetta kundi bent á, at kappingarnevndin umhugsar at fara undir eina skipan, har tey gulu kortini verða vigað, og stig latin alt eftir hvat kortini verða givin fyri. Henda skipan verður eitt nú nýtt í Danmark, har leikarar fáa leikbann, tá ið teir røkka einum ávísum stigatali.

Bjarki Mohr váttar eisini, at henda skipan hevur verið umrødd í kappingarnevndini, men í fyrstu atløgu verður skipanin ikki tikin í nýtslu her heima, tí hetta krevur eina stóra umsiting, sum vit ikki hava í løtuni, sigur formaðurin í kappingarnevndini.

## Greiðari linjur

Eitt annar lógaruppskot hjá kappingarnevndini er, at leikarar, sum spæla bæði í vaksnamannadeildunum og í ungdómsdeild, ikki skulu rakast av leikbanni tvørtur um deildirnar. Tað vil siga, at ein unglingaspælari, sum t.d. fær reytt kort í 1. deild, skal sita leikbannið av sær í 1. deild, tí tað var har, at hann fekk kortið.

Áður hevur tað verið so, at spælarin hevur sitið leikbannið av sær í næsta umfarinum, men hesar reglur hava verið rættuliga fløkjasligar og hava mangan elvt til nógv stríð úti í feløgunum.

– Vit koma við hesum uppskotinum fyrst og fremst fyri at menna unglingarnar. Men tað er sjálvsagt eisini fyri at hjálpa feløgunum, ið mangan hava havt ilt við at fylgja við í, nær og hvar ein ungdómsleikari er leikbannaður, sigur Bjarki Mohr.

# Fair Play fyri øll

**Kappingarnevndin hjá FSF heitir á aðalfundin hjá fótbóltssambandinum um at góðkenna eitt lógaruppskot, ið gevur kappingarnevndini heimild til at gera nakað við venjarar og leiðarar, ið bera seg ósømiliga at undir dystum**

AÐALFUNDUR

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Bjarki Mohr sigur, at tað er ein afturvendandi trupulleiki, at bæði venjarar og leiðarar annars sýna seg ósømiligan atburð undir dysti, og at hetta er galdandi bæði í ungdómsdeildum og í vaksnamannadeildunum.

Formaðurin í kappingarnevndini sigur, at í heilum fær fráboðan frá dómarum um ósømiligan atburð hjá venjarum og leiðarum, men at kappingarnevndin ikki hevur nakra heimild til at geva viðkomandi persónum nakra revsing.

– Tað kann ikki verða rætt, at tað bara eru spælararnir, ið skulu sýna Fair Play, tí hetta má eisini verða galdandi fyri venjarar, leiðarar, og onnur fólk kring lið og feløg. Tí er tað umráðandi, at vit fáa heimild frá aðalfundinum til at gera nakað við slíkan ósømiligan atburð, sigur Bjarki Mohr.